gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Ítróttur: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

Avtalubrot

Oddagrein

Tá Signar á Brúnni, landsstýrismaður, fór frá herfyri, var sambært honum ein avtala um, at nýggjur landstýrismaður ikki skuldi setast, fyrr enn kanningarstjórin í málinum var liðugur við sítt arbeiði. Hendan avtalan er eftir øllum at døma brotin, og sostatt kunnu vit staðfesta eitt avtalubrot. Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, hevur verið kvikur at nýtt orðið avtalubrot, hóast ilt hevur verið at sæð nakra brotna avtalu nakrastaðni - til nú væl at merkja.

Gamalt er, at ein maður er ein maður og eitt orð er eit orð, men eftir hesum málinum at døma hevur leiðsla Tjóðveldisfloksins eitt heldur avslappað forhold til lyfti og avtalur. Formaður Tjóðveldisfloksins sigur, at tað ber ikki til at bíða til kanningin er liðug, hóast hon væntast um fáar vikur. Sostatt kunnu vit staðfesta, at leiðsla Tjóðveldisfloksins hevur lovað meiri, enn hon kundi ella vildi halda.

Øll framferðin í hesum málinum hevur verið ikki sørt óhampulig. Fyrst vildi løgmaður ikki geva Signari á Brúnni eina kanning, hóast løgmaður kann kanna tað honum lystir, og nú sær tað so út sum at ósjálvsøkna loysn á trupulleikunum á SVF, har Signar á Brúnni m. a. tryggjaði, at lønir til SVF-starvsfólkið vóru útgoldnar, er dømd frammanundan av hansara egnu partamonnum. Ringt er at síggja, at nakrar vikur skulu gera tann stóra munin viðvíkjandi Undirvísingar og Mentamálastýrinum. Løgtingið kemur ikki saman fyrr enn á ólavssøku, og Høgni Hoydal sigur seg vera vísan í, at Signar á Brúnni fer at verða reinsaður, tá kanningin er liðug, og sum Sosialurin skilir, so verður hettar um ólavssøkumundið. Hettar tykist ikki at hanga rættiliga saman.

Ættarliðsskifti hevur verið í leiðslu Tjóðveldisfloksins, har yngri kreftir tykjast troðka eldra ættarliðið út, men ikki er tað teimum til miklan sóma at døma ein av sínum egnu, áðrenn nøkur kanning er liðug. Spurningurin er, um Tjóðveldisflokkurin við sínum atburði móti Signari á Brúnni ikki hevur dømt hann, óansæð niðurstøðuna hjá kanningarstjóranum.

Hettar málið um Signar á Brúnni hevur borið seg skeivt at ella ikki, er ikki greitt enn, tí kanningarstjórin ikki er liðugur við sítt arbeiði. Tað einasta, ið tykist greitt er, at leiðsla Tjóðveldisfloksins hevur framt avtalubrot, óansæð hvat úrslitið verður av kanningini av Signari á Brúnni, og hvat man annars heldur um málið.

Spurningurin er, um álit ikki júst er kjarnin í málinum. Hvussu kann man vænta, at avtalur í framtíðini verða hildnar av leiðslu Tjóðveldisfloksins, tá teir sambært einum av egnu tinglimum hava brotið eina klára avtalu? Hvussu kann borgarin hava álit á, at teir ikki eisini í øðrum málum hava lovað ov nógv, soleiðis sum andstøðan førir fram í eitt nú fullveldismálinum?

Sosialurin

Viðmerking:

Hvat eru Grønland og Danmark?

Um Føroyar er ein strategiskur gullklumpur í NATO høpi

NATO og loysing:
Tað er altíð lætt at spinna tankagull úr huganum. Tá til veruleikan kemur, er roknistykkið ofta annarleiðis. Hjá loysingarfólkið renna í hesum døgum tíggjutals milliardir í Landskassan, av tí at vit eru nærum „snýtt" av Danmark í samband við Nato herstøðina (At hernaðarmálið hevur verið „loyniligt", er nærum besta „prógvið" - sjálvt um hernaðarviðurskiftir allarstaðir í heiminum eru loynilig). Smb teimum eiga vit eitt stað ímillum 30 og einar 100 milliardir til góðar á hesi konto - á pappírinum - væl at merkja. Tá eru tølini helst undirmett smb. loysingarfólkum. Um vit biðja um hendan pening, so hava hinir bert gjalda. So sólaklár tykjast hesi viðurskiftir vera, smb teirra einsíðugu metingum.

Ja, tað er ikki eiti á virði í Føroyar hava. Tað er helst eitt mistak, at vit bert ganga á asfalteraðum vegum, tí vegirnir skuldu helst verið av marmor, um vit ikki vóru so „grúiliga snýtt" av.. , ja, gita hvørjum.

NATO og veruleikin:
Hyggja vit eftir landafrøðiliga kortinum eina løtu, so man lítil ivi vera í, at Grønland, Ísland, Norðurnoreg og Føroyar hava havt ein strategiskan týdning í Eyst-Vest høpi. Tá ið hugsað verður um loftmegi eins og hermegina á sjónum.

Taka vit herflotan hjá Warsava londunum, so skuldi hesin á veg inn/út í Atlanshavið framvið Norðurnoregi og Føroyum á veg til Norðuramerika.

Tá talan var um annan part av herflotanum, nevniliga tann í Eystrasalti, so er annað strategiskt øki, ið hevur sera stóran týdning.

Nevniliga Danmark. **Tí Danmark hevur lykilin til allar havnabýirnar í Eystrasalti hjá fyrrverandi Warsavalondunum** Sovjett, Estland, Letland, Litauen, Póllandi og Eysturtýskalandi. Tí sjálvt minsta jolla skal ígjøgnum danskt farvatn inn og úr Eystrasalti Ein kann spyrja, um Danmark við síni plasering á landkortinum ikki, eins og vit, eru ein sannur gullklumpur í Nato høpi.

Mær tykir, at strategiski týdningur Danmarkar er heilt gloymdur í kjakinum hjá loysingarfólkum um NATO og Ríkisfelagsskapin. Ja, eftir míni hugsan hava tey gloymt so nógv, serliga veruleikan

Hava teir vunnið uppá okkum.

Ella vit uppá teir.

Ella liggja øll londini so væl fyri, at øll hava fingið rabat? Tað finnast helst aðrar metingar um hesi viðurskiftir, enn ein sera einsíðug loysingar meting. Teir áttu at veri varnir, tí tað kann hugsast, at aðrir møguliga kundu sent rokningar við eins góðum rætti og loysingarfólk.

Vinarliga
Marjus Dam,
løgtingsmaður

Veljarakanningar

Nógv hevur verið skrivað um veljarakanningar fyri og ímóti, og ofta hevur verið víst á, at tær ikki vóru eftirfarandi. Sjálvur havi eg ongantíð fjeppast uppi í teimum, plagdi at vísa á, at mannamúgvan sang hosianna pálmasunnudag, og longu fríggjadagin róptu tey krossfest, krossfest. Tær eru komnar fyri at vera enn eina tíð, í hvussu so er, men tær mugu lesast við hógv og fyrivarni, og tær kunnu ikki stjórna landinum. Andstøðan og bløðini hjá henni hava gjørt nógv burtur úr teimum seinastu veljarakanningum og vildu, at landsstýrið skuldi broyta sín politikk, so at hann kundi samsvara teimum. Tíbetur er samgongan so mikið at sær komin, at tað ikki hevur nervað hana nevnivert.

Seinastu veljarakanning er ikki so nógv gjørt burturúr, men hon hevur fingið Javnaðarflokkin aftur einaferð enn at snara sær á. Veðurhanar snara eftir ættini. Aðrir tónar hoyrast nú í blaðnum, og teir fríggja til Fólkaflokkin. Hvørki bløðini ella Útvarpið, sum annars gera nógv burtur úr slíkum kanningum, hava heft seg við, at Javnaðarflokkurin gongur aftur, og at teirra formaður ikki fær undirtøku av øllum javnaðarveljarunum til at verða ein møguligur løgmaður. Hetta hendir fyri ein andstøðuflokk, sum hevur brúkt orku og allar snildir til at mótarbeiða landsstýrinum, uttan sjálvir at koma við einum realistiskum politikki fyri okkum í framtíðini, hvørki



her heima ella viðvíkjandi sambandinum við danir. Teir tosa um solidaritet og vælferðarsamfelag, men hetta eru bara tóm gomul orð, sum ikki minst í Danmørk púrastaðni verða umtulkað: Hvat skal eitt føroyskt vælferðarsamfelag byggja á, hvussu skal tað síggja út? Hvat vil danski Javnaðarflokkurin ganga við til av broytingum í Føroyum? Veit Javnaðarflokkurin tað?

Heimastýrislógin skal broytast, siga teir, men hvat skal broytast og hvussu? Tá ið flokkar ongar høvuðsætlanir hava, mugu teir fara frá sak til sak, men verri er, at teir noyðast at brúka líkt sum ólíkt til verju. Teirra vápn verða skitnari og skitnari. Nú eina tíð eru tað lógargreinar, teir brúka móti landsstýrismonnunum. Tað gjørdi danski Javnaðarflokkurin eisini, men tá hann so sjálvur kom til valdið, minnast vit føroyingar, at hann boðaði frá, at juristar ikki skuldu stjóran landinum.

Minnast vit aftur á tosið fyri seinasta val, eru stórar broytingar farnar fram. Ein partur av fólkinum er vaknað og farið til verka heilt øðrvísi enn í áttatiárunum, ja tað er ikki samberuligt, men sjálvandi er ein partur eftir, sum enn gníggjar svøvnin úr eygunum, tað mugu vit bera yvir við, eisini tey vilja koma fyri seg og fara til verka, men tað er at taka morgunin í akt. Sólin er við at koma upp á himmalin, so tað nyttar teimum báðu stóru flokkunum einki og teirra bløðum at royna at rura fólk í blund aftur, kanska okkurt gamalt ella ússaligt fólk, men tey kunnu fáa frið til at sova eina løtu afturat. Tað var ótrúliga ljótt og grovt, at formenninir fyri báðar andstøðuflokkarnar einki annað høvdu at siga okkara lógliga valda landsstýri, beint áðrenn teir skuldu fara til umráðandi samráðingarnar við donsku stjórnina, enn: »Leggið frá tykkum«. Hetta verður standandi.

Einaferð var sagt: »Stauning ella kaos« (sagt fyrr og síðan), men um nú hetta landsstýrið legði frá sær, hvussu greið mundi støðan tá verið. Hvør skuldi myndað landsstýrið? Hvør skuldi verið løgmaður t.d. Vildi hon so bara tikið móti diktati frá Nyrup Rasmussen, og so brúkt alla orku, sum teir plagdu, at snara og dreyga málinum aftur og fram, fyri at fáa fólk at svølgja, men nú eru nógv fólk vaknað, nógv er komið fram í ljósið. Tað vendist ikki aftur til støðuna undan seinasta vali. Teirra andstøða hevði ikki bara verið nakrir fáir politikarar, sum sótu og kroystu okkurt burtur úr sær. Nei, nú er ein stórur vakin veljaraskari úr fleiri flokkum, sum fylgir væl við og letur sær ikki alt bjóða. Veðurhanar eru veðurhanar og góðir til sítt brúk, men teir siga einki um kósina.

Steinbjørn B. Jacobsen

Lesið eisini Sosialin á Internetinum

www.sosialurin.fo

Hvalurin fær sersømdir

– Í trúnni hjá Paul Watson hevur hvalurin serstø›u millum súgdjórini. Og ta› er bló›skeivt at n‡ta har›skap fyri at broyta okkara hugsjón um hvalin, sigur Pál Weihe.

DIA MIDJORD

Pál og Paul eru rúkandi ósamdir. Pál er yvirlækni og granskari, Paul er umhvørvisma›ur og hvalahir›i. Pál eitur Weihe til eftirnavn og er yvirlækni á deildini fyri Arbei›s- og Almannaheilsu. Hann er alt anna› enn hugtikin av framfer›arhátti Watson´s, sum hevur gjørt seg til talsmann og verja hjá grindahvalinum.

Bló›skeivt

– Hví skal hvalurin hava eina serstø›u millum súgdjórini, menniskju gagnn‡ta, spyr Pál Weihe og sigur seg enn ikki hava hoyrt eitt einasta argument hesum vi›víkjandi frá Paul Watson.

– Eg kann bert ímynda mær, at í trúnni hjá Paul Watson hevur hvalurin hesa serstø›u millum súgdjór. Men hann má ikki brúka har›skap fyri at broyta hugsan føroyinga. Ta› er heilt burturvi›, sigur Pál Weihe.

Yvirlæknin sigur, at føroyingar hava rætt til at drepa grind, tí hesin stovnur er langt frá hóttir. Og føroyingar hava eisini gjørt nógv fyri at betra seg. Eitt nú er drápshátturin vi› árunum vor›in nógv meira humanur.

Pál Weihe, yvirlækni á deildini fyri Arbei›s- og Almannaheilsu, heldur, at Paul Watson, sum ein rættur umhvørvisma›ur, átti at vart hvalin móti dálking í havinum

Hesin ma›urin megnar ikki at grundgeva, hví hvalurin skal hava serstø›u millum súgdjórini, i› menniskju gagnn‡ta. Tískil kann ta› bert vera naka›, i› hevur vi› trúgv hansara at gera, heldur Pál Weihe

Okkara vinir

Pál Weihe hevur granska›, hvussu dálking av tungmetallum ávirkar menningina hjá børnum, og hann kann vi› tølum prógva, at hvalurin er dálka›ur vi› evnum sum eitt nú PCB og DDT.

– Henda dálking, i› stavar frá menniskjum, førir vi› sær, at okkara børn ver›a ávirka› skeiva vegin. Tískil skuldi Paul Watson, um hann veruliga var ein umhvørvisma›ur, vart hvalin móti hesum, sigur Pál.

– Hví fer hann ikki út at verja hvalin, so hann ikki doyr av dálking, spyr hann og sipar til, at Watson og onnur umhvørvisfólk áttu at veri› okkara vinir og ikki fíggindar.

Mátingarstø›

Pál Weihe heldur ta› er av stórum t‡dningi, at føroyingar bjó›a seg fram sum vaktarmenn fyri hval í Nor›uratlantshavi. Hetta kundi veri› okkara andlit úteftir.

– Geografiskt liggja vit so væl fyri sum nakar. Og høvdu vit eina mátingarstø› í Føroyum, so kundu vit kanna› og uppl‡st heimssamfelagi› um stø›una hjá hesum súgdjórum.

– Vit hava jú ikki naka› í klemmu hjá nøkrum, so vit kunnu tosa bæ›i vi› eystur og vestur, sigur Pál Weihe, yvirlækni á deildini fyri Arbei›s- og Almannaheilsu.

Taktiskt ella bara langt úti

VI›M. DIA MIDJORD

Vit vistu, at Paul Watson kom, men fingu ongar uppl‡singar frá løgregluni, hvar hann lá. Fjølmi›larnir máttu finna hann, og ta› gjørdu teir eisini.

Sí›an hevur alt veri› dult sum mansmor›, og hetta førir vi› sær, at fjølmi›larnir halda ta› vera spennandi at fylgja í kjalarvørrinum hjá Ocean Warrior.

Paul Watson hevur fingi› eina bót á 50.000 krónur fyri at bróta útlendingalógina. Ein høvu›sorsøk var, at hann ikki hev›i akta› bo›um og hev›i veri› inni í føroyskum sjógvi.

Nú hevur hann so veri› sightseeing bæ›i í Hestfir›i og í Vestmannasundi, og løgreglan hevur enn einki gjørt vi› hann. Um hann fær enn eina bót ella talan ver›ur um handtøku av manninum hesafer›, kann bert tí›in vísa.

Hendir einki, kunnu vit sta›festa, at Paul Watson spælir hund vi› løgregluna. Hann fekk bót fyri at vera eitt sindur innanfyri, men hevur seinni veri› langt og leingi innanfyri.

At fjølmi›larnir ikki fáa at vita, hvørja ætlan løgreglan hevur, ta› er ikki so løgi›. Slíkt skal man ikki hava at vita. Men samskifti millum politi og fjølmi›lar kundi veri› eitt sindur frægari.

Ta› er jú ein sannroynd, at dylir tú naka› fyri fjølmi›lunum, so gera hesir ofta meira burturúr. Fleiri uppl‡singar frá løgregluni høvdu eftir mínum tykki tiki› broddin av sensatiónini, i› allir so fegnir vilja bor›rei›a vi›.

Kanska er talan um taktikk frá løgregluni. Men ta› hongur ikki saman, tá Watson fær bót fyri at hava veri› eitt sindur innanfyri, men einki hendir, tá hann hevur veri› heilt inni á føroysku fir›unum.

Hvussu ver›ur løgregla okkara umtala› í útlondum, tá hetta er mannagongdin?